# Niðurstøðan kemur mánakvøldið

**Ein partur av tingmanning sambandsflokksins hevði fund á gamla apotek beint eftir tíðindini bórust, um at Jóannes Eidesgaard, løgmaður, hevði loyst landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Jóhan Dahl, úr starvi**

POLITIKUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tíðindaskrivið frá løgmansskrivstovuni um at Jóhan Dahl var loystur úr starvi sínum sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum, var ikki meiri enn komið út, so hevði sambandsflokkurin fund á gamla apotek. Av tí at fundurin var fráboðaður so mikið knappliga, var ikki øll tingmanning sambandflokksins til staðar.

### Nýggjur fundur mánakvøldið

Eftir fundin fyrrapartin mánadagin fingu vit orðið á Alfred Olsen, virkandi formann í Sambandsflokkinum. Hann segði stutt, at á fundinum høvdu tey í stuttum kunnað hvønn annan um tað, ið var farið fram síðstu dagarnar og serliga mánamorgunin, tá ið løgmaður loysti Jóhan Dahl úr landsstýrissessinum. Av tí at fundurin ikki var fullmannaður, var nýggjur fundur ásettur mánakvøldið klokkan seks, og eftir tann fundin fór flokkurin at koma við einari niðurstøðu um alt tað, ið er farið fram seinastu dagarnar.

Alfred Olsen vildi ikki gera nakra viðmerking til, um avgerð løgmans kom óvart á hann, ella um avgerðin fór at hava nakra ávirkan á samgonguna sum heild.

Suðurstreymoya Sambandsfelag:

# Nú skal álitið endurreisast

**– Sjálvsagt vil eitt og hvørt valdømi hava umboð í Tinganesi, men nú mugu vit fyrst og fremst lata tingmanningina taka ta avgerð, sum er best fyri flokkin, uttan at fokus verður sett á persónar, sigur Anfinn Brekkstein, formaður í suðurstreymoya sambandsfelag, Føroya Væl**

KREPPA Í SAMBANDSFLOKKINUM
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Oddamaðurin í Føroya Væl metir tað nú vera alneyðugt at hugsa kollektivt og seta fokus á flokkin eftir tann skaða, flokkurin hevur fingið, síðani Johan Dahl varð valdur nýggjur landsstýrismaður í Fiskivinnumálum.



*– Sjálvsagt vil eitt og hvørt valdømi hava umboð í landsstýrinum, men fyrst og fremst mugu vit nú hugsa kollektivt og taka ta avgerð, sum er best fyri flokkin, sigur formaðurin í valfelagi Sambandsfloksins í Suðurstreymoy, Anfinn Brekkstein*

Eins og formaðurin í Norðoya Sambandsfelag fjalir Anfinn Brekkstein ikki fyri, at eitt og hvørt valfelag vil hava sín landsstýrismann, serliga tá hugsa verður um, hvussu nógvar atkvøður eru at kappast um.

– Vit fingu 2980 atkvøður í Suðurstreymoy á næst seinasta vali, og hóast talan var um afturgongd, eru jú nógvar atkvøður at vinna við einum landsstýrissessi, sigur Anfinn Brekkstein. Hann leggur afturat, at t.d. fór Sambandsflokkurin nógv fram í Norðoyggjum, og at teir tískil eisini eru eitt alternativ, eftir at umstríddi Johan Dahl mánamorgunin fekk sekkin frá løgmanni.

### Flokkurin fremst

Men Anfinn Brekkstein undirstrikar, at nú má fyrst og fremst hugsast um flokkin og hvussu tann skaði verður bøttur, Sambandsflokkurin hevur fingið seinastu tíðina.

– Tingmanningin má nú seta seg niður og revaluera, hvussu flokkurin í semju kann endurreisa álitið og fáa arbeiðslagið í gongd, uttan at talan beinanvegin gerst um persónsstríð og kapping millum valdømini, sigur Anfinn Brekkstein avgjørdur.

Sum formaður í valfelagi Sambandsfloksins í Suðurstreymoy vísir hann aftur útsøgnunum hjá býráðslimi floksins Beate L. Samuelsen um, at flokkurin hevur mist limir.

– Eg havi kannað tað, Beate hevur sagt, og eg veit satt at siga ikki, hvaðani hon hevur hetta, tí vit hava onga formella fráboðan fingið um nakran lim, sum hevur tikið seg úr felagnum, sigur Anfinn Brekkstein. Hann leggur afturat, at teir tó hava fingið ábreiðslur frá bæði limum og stuðlum annars fyri framferðarhátt floksins í sambandi við fyrrverandi fiskimálaráðharran.

Norðoya Sambandsfelag:

# Heldur fast um sítt ynski

**John William Joensen, formaður í Norðoya Sambandsfelag, heldur fast um kravið at fáa nýggjan fiskimálaráðharra úr Norðoyggjum, og verður ynski hansara gingið á møti, er Bjørn Kalsø á veg í Tinganes**

KREPPA Í SAMBANDSFLOKKINUM
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Í kjalarvørrinum av frálíka úrslitið Sambandsfloksins á valinum í Norðoyggjum 20. januar vóru røddir frammi um, at ein landsstýrismaður floksins skuldi veljast úr Norðoyggjum, men saman við Suðurstreymi máttu norðoyingar síggja Bárð Nielsen úr Norðstreymi og Johan Dahl úr Suðuroy fara í ávikavist Fíggjarmálaráðið og Fiskivinnumálaráðið.

Men eftir at løgmaður loysti Johan Dahl úr sessinum sum fiskimálaráðharri fyrrapartin í gjár, sær John William Joensen úr Norðoya Sambandsfelag aftur møguleikan fyri sær.

– Alt er sera nýtt, og fyrst mugu vit bíða eftir niðurstøðuni frá tingmannafundinum, men vit halda fast um ynski okkara at fáa ein landsstýrismann haðani úr Norðoyggjum, sigur John William í stuttari viðmerking.



*– Vit halda fast um ynski okkara at fáa landsstýrismann úr Norðoyggjum, og okkara umboð er so Bjørn Kalsø, segði John William Joensen í stuttari viðmerking áðrenn tingmanning Sambandsfloksins var liðug at fundast fyrrapartin mánadagin*

Hóast aðrir tykjast fremri í røðini hjá Sambandsflokkinum at skula í Tinganes, er Bjørn Kalsø við flestum atkvøðum av Norðoya Sambandsfelag instillaður at gerast nýggjur landsstýrismaður í Fiskivinnumálum.



# Ragnarok í Sambandsflokkinum

**Fyrrverandi landsstýrismaðurin hjá Sambandsflokkinum, Eilif Samuelsen, langar út eftir tingmanningini hjá Sambandsflokkin. Hann heldur, at flokkurin hevur onga styrki longur og skírir flestu tinglimirnar fyri at vera sjálvssøknar**

KREPPA Í SAMBANDSFLOKKINUM
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Sambandsflokkurin rør í løtuni ein hin tyngsta róðurin í søgu floksins. Søgurnar hava leingi gingið um, at innanhýsis í Sambandsflokkinum hevur stríð valdað og seinastu dagarnar hava prógvað, at limirnir í tingmanningini hjá Sambandsflokkinum eru alt annað samdir.

Um vikuskiftið eru innanhýsis stríðsmálini í Sambandsflokkinum veruliga komin til sjóndar. Hóast flokkurin meldaði alment út fríggjadagin, at flokkurin stuðlaði Johan Dahl, so er kortini komið fram, at bæði Lisbeth L. Petersen og Alfred Olsen ikki tóku undir við stuðulinum.

Býráðspolitikkarar fyri Sambandsflokkin í Havn og Klaksvík hava eisini givið til kennar, at teir ikki vóru samdir við avgerðini hjá tingmanningini at stuðla fyrrverandi Fiskimálaráðharranum.

Nú hoyrist eisini, at fleiri limir í Sambandsflokkinum venda flokkinum bakið. Innanhýsis stríðið og aggið í Sambandsflokkinum fær nú fyrrverandi landsstýrismannin hjá Sambandsflokkinum, Eilif Samuelsen, at tala at.

### Sjálvmál

Eilif Samuelsen sigur, at rumblið um fortíðina hjá Johan Dahl átti slettis ikki at komið fyri

– Mann visti fullvæl, hvat Johan Dahl hevði gjørt á Vágs Skipasmiðju. Tað átti at verið nóg mikið til, at flokkurin sá burtur frá honum. Tað sum síðan er komið fram, kundi mann so ikki vita, men bara at hann stóð á odda fyri Vágs Skipasmiðju átti at verið nóg mikið. Flokkurin hevur altíð sett reinførið hjá landsstýrisfólkunum fremst og tí var avgerðin um at seta Johan Dahl óheppin, sigur Eilif Samuelsen.

### Ongin disiplin

Eilif Samuelsen sigur, at tað kennist ómetaliga sárt at síggja støðuna Sambandsflokkin í dag. Hann lýsir flokkin fyri at vera høvuðleysan, sum hann málber seg.

– Flestu fólkini í tingmanningini arbeiða ikki fyri flokkin, men bara fyri seg sjálvan. Tað hoyrir ongastaðni heima, at flokkurin fer út í fjølmiðlarnar og sigur hvør hevur atkvøtt fyri hvørjum landsstýrismanni, sigur hann.

Eilif leggur afturat, at Sambandsflokkurin hevur altíð lagt dent á, at øll innanhýsis mál verða viðgjørd innanhýsis og at tað er formaður floksins um úttalar seg vegna flokkin.

– Tað eru avgjørt nýggir tónar, at øll skulu fáa at vita, hvørjar ósemjur eru í flokkinum. Allir flokkar hava av og á stríð innanhýsis, men limirnir hava somikið av disciplin at tað ikki kemur út. Tingmanningin í dag hevur onga floksdisciplin, sigur Eilif Samuelsen.

### Einki upplagt formansevni

Seinast í mars mánaði hevur Sambandsflokkurin árliga landsfundin og tá lagt upp til eitt satt ragnarrok, har viðurskiftini í flokkinum seinastu mánaðirnar óivað verða endavend. Eitt av høvuðsevnunum á fundinum verður at kjósa ein nýggjan formann.

Eilif Samuelsen sigur seg ikki síggja nakran lim í tingmanningini sum eitt upplagt formansevni. – Ongin hevur í løtuni tær neyðugu dygdinar til at leiða flokkin. Tá mann ikki fær tað besta, so má mann noyðast við tað næst besta, vísir Eilif á.

Eilif Samuelsen heldur, at eingin styrki er í flokkinum longur. Hann sipar serliga landsstýrismannabýtið, har Sambandsflokkurin eftir hansara meting fekk alt ov lítið burtur úr.

– At minsti samgonguflokkur fær flestar landsstýrismenn er ov vánaligt. Sum størsti flokkuri, átti flokkurin sjálvsagt at fingið flestar landsstýrismenn, sigur hann.

# Lagnan hjá Johan Dahl:

**3. februar:**
Johan Dahl verður settur sum landsstýrismaður við fiskivinnumálum.

Jóannes Eidesgaard sigur seg hava álit á Johan Dahl sum landsstýrismanni.

Johan Dahl heldur, at skuldsetingarnar um hansara fortíð er ein herferð ímóti sær.

**4. februar:**
Grein í Fregnum um, at Johan Dahl skyldar Vágs Skipasmiðju 100.000 krónur

**11. februar:**
Dimmalætting hevur grein um, at Johan Dahl hevur lagt fyrisitingina í Fiskimálaráðnum undir at gera mun á fólki

**12. februar:**
Grein í Sosialinum um, at Johan Dahl ikki vildi rinda fólki á Kollafjord Pelagic frítíðarløn og løn

**17. februar:**
Johan Dahl sigur við Sosialin, at hann letur seg ikki trýsta frá.

**19. februar:**
Einkjan eftir Carl á Lag sigur við Fregnir, at Johan Dahl hevur forpestað hennara lív.

**20. februar:**
Alfred Olsen sigur í Dimmalætting, at Johan Dahl er ein trupulleiki fyri Sambandsflokkin, men fríggjakvøldið hevur hann kortini álit á honum

**21. februar:**
Býráðslimir fyri Sambandsflokkin í Havn og Klaksvík vilja hava Johan Dahl úr starvinum

**23. februar:**
Johan Dahl verður koyrdur úr starvinum sum landsstýrismaður